## Neyðtóku fangar í Abu Ghraib

Barrack Obama, forseti, sýtir fyri at almannakunngera myndir, sum sambært einum bretskum blaði vísa, at amerikanskir hermenn neyðtóku irakskar fangar - bæði menn og kvinnur - í tí tiltikna fongslinum Abu Ghraib. Blaðið Daily Telegraph hevur tosað við ein fyrrverandi amerikanskan general, sum hevur skrivað eina frágreiðing um tað, sum fór fram í fongslinum. Generalurin, Antonio Taguba, sigur, at innihaldið í frágreiðingini er verri enn tað, sum higartil er komið fram um viðferðina, sum fangarnir í Abu Ghraib fingu frá amerikonsku vaktarmonnunum.



## Kann sendast til Rwanda

Hægstirættur í Svøríki hevur staðfest, at ein maður úr Rwanda, sum situr í varðhaldi í Svøríki, kann sendast til Rwanda, har hann er skuldsettur fyri at hava luttikið í fólkadrápinum í 1994. Maðurin kom til Danmarkar fyri átta árum síðani og hevur búð har sum flóttamaður. Í juli í fjør var hann í Svøríki, men har bleiv hann handtikin, tá embætismenn hjá rwandisku sendistovuni í Stockholm kendu hann aftur. Rwandiska ákæruvaldið vil vera við, at tann tikni maðurin hevði ábyrgdina av, at fleiri túsund fólk vórðu myrd nærhendis høvuðsstaðnum Kigali tann 7. apríl í 1994.

# Bygdaráðið fer at akta fólksins vilja

**Um tvær vikur verður fólkaatkvøða í Kvívík um, hvørjum kommunum, kvívíkingar skulu samstarva við og borgarstjórin sigur, at bygdaráðið fer at lurta eftir fólksins vilja**

KOMMUNU-SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ongin ivi, at vit fara at fylgja fólksins vilja.

Hósdagin 11. juni, skulu kvívíkingar á fólkaatkvøðu at siga sína hugsan um, hvørja kommunu, Kvívík skal samstarva við í framtíðini.

Og Dánjal Petur Müller, borgarstjóri í Kvívík, lovar longu nú, at bygdaráðið fer at akta fólksins vilja og at gera eftir úrslitinum av atkvøðugreiðsluni.

- Hóast tað er bygdaráðið, sum tekur formligu avgerðina, er tað greitt, at vit fara at taka fólkaatkvøðuna til eftirtektar, sigur hann.

- Gera vit ikki tað, er heldur ongin orsøk til at hava fólkaatkvøðu, leggur hann afturat.

### Tríggjar møguleikar

Í gjárkvøldið var borgarafundur í Kvívík um framtíðar samstarv hjá Kvívíkar Kommunu, har væl av fólki varð møtt upp og tað tekur borgarstjórin sum tekin um, at hetta er ein spurningur, sum hevur almennan áhuga.

Á fundinum var eisini Hilmar Høgenni í innlendismálaráðnum komin at greiða kvívíkingum frá tí tekniska partinum av tí, sum tey skulu taka støðu til á fólkaatkvøðuni.

Dánjal Petur Müller leggur dent á, at tað, sum kvívíkingar skulu taka støðu til, er ikki at leggja Kvívíkar Kommunu saman við nakarari aðrari kommunu.

Talan er eina og aleina um at taka støðu til, hvørja kommunu, vit skulu samstarva við framyvir, sigur hann.

Tá ið spurningurin er uppi nú, er tí, at landsstýrið hevur álagt kvívíkingum at taka støðu til málið fyri 1. oktober, annars tekur landsstýrið avgerðina einsamalt.

Landsstýrið hevur eisini gjørt av, at Vestmanna og Kvívík skulu fara í sama kommunula samstarv og kommunurnar báðar fingu tríggjar kostir í at velja.

Ein møguleiki er at gera sum vestmenningar og velja at samstarva við Tórshavnar Kommunu. Ein annar møguleiki er at samstarva við kommunurnar í Sundalagnum og triði møguleikin er at samstarva við vesturøkið, sum er Vága Kommuna og Sørvágur.

Vestmenningar hava longu tikið støðu til at samstarva saman við Streymoynni, sum í veruleikanum merkir Tórshavnar Kommunu.



*Á borgarafundi í Kvívík í gjárkvøldið, greiddur Dánjal Petur Müller, borgarstjóri, høgrumegin og Hilmar Høgenni úr innlendismálaráðnum, bygdarfólkinum frá, hvørjir møguleikar tey hava. Sjálvur heldur borgarstjórin, at frægasta loysnin er at fara vestur eftir*

### Heldur vestur eftir

Hóast vestmenningar longu hava gjørt av at krøkja seg upp í Tórshavnar Kommunu, heldur Dánjal Petur Müller, at kvívíkingar hava ein veruligan valmøguleika.

- Velja kvívíkingar at samstarva við Tórshavnar Kommunu, loysir trupulleikin seg av sær sjálvum. Men velja teir annan av hinum møguleikunum, er tað ein spurningur, sum vit mugu taka upp við landsstýrið, tá ið tann støðan fyriliggur.

Sjálvur heldur borgarstjórin at tað skilabesta hjá kvívíkingum er at samstarva vestureftir við Vágar, heldur enn við Tórshavnar kommunu.

- Tórshavnar Kommuna er so stór, at tað er vandi fyri, at vit drukna í henni. Velja vit at samstarva vestureftir, eru vit ikki so lítlir í tí samstarvinum, at vit ikki fáa eitt orð at siga, heldur hann.

Hinvegin er hann ikki fyri, at leggja Kvívíkar kommunu beinleiðis saman við aðrari kommunu.

- Eg haldi, at vit eiga at samstarva fyrst og at vit eiga at hugsa okkum væl um, áðrenn vit leggja saman, tí hava vit fyrst lagt saman, vendst ikki aftur.

Hinvegin ivast hann ikki í, at hendan fólkatkvøðan um samstarvsøki, verður ein forsmakkur upp á, hvønn veg Kvívíkar Kommuna skal fara, táið kommunurnar skulu leggjast saman.

Og tað verður longu næsta ár, tí landsstýrið hevur sett sær fyri at frá 1. januar í 2011 skal alt landið verða lagt saman í einar sjey kommunur.



*Á borgarafundi í Kvívík í gjárkvøldið, fekk bygdarfólkið at vita, at tey hava tríggjar møguleikar og borgarstjórin sigur við Sosialin, at ongin ivi er um, at bygdaráðið fer at fylgja fólksins vilja*

# Vísa føroyska aling fram fyri øllum Evropa

**Í hesum døgum er felagið fyri alarar í øllum Evropa í Føroyum og heldur fund**

Í gjár komu alarar úr øllum Evropa til Føroyar, her teir skulu hittast at halda fund hesar næstu dagarnar.

Talan er um felagsskapin FEAP, ið er felagið fyri alarar í Evropa, sum nú er komið til Føroyar og á fundi í morgin og í ovurmorgin fara teir at tosa um ymisk viðurskifti av felags áhuga.

Tað er Havbúnaðarfelagið, sum er vertur fyri fundin, har alarar úr 19 londum eru komnir saman.

Ragnar Joensen, sum er formaður í Havbúnaðarfelagnum, sigur, at í dag verður ferðast runt ymsastaðni í landinum at hyggja at alibrúkum og so verður fundur í morgin og leygardagin.

Hann sigur, at sum so eru tað ikki nøkur mál, sum hava serligan týdning fyri Føroyar, sum skulu umrøðast.

Men kortini fer Havbúnaðarfelagið at kunna um føroyska aling.

Og serliga fer Havbúnaðarfelagið at kunna alararnar úr hinum londunum um okkara fiskaheilsuskipan, sum Ragnar Joensen sigur, er so góð og framkomin, at hon saktans kann vera ein fyrimynd hjá øðrum.

Tað eru mest ES limalondini, sum eru umboðaði í felagnum, men eisini Føroyar, Noreg, Ísland, umframt Turkaland, Ungarn og onnur lond eystanfyri, sum ikki eru limur í ES, eru limir í felagnum.

FEAP er ein lobbyfelagsskapur, sum serliga arbeiðir við at ávirka ES politikkin á aliøkinum, bæði í sambandi við sjúkufyribyrging, umhvørvi og marknaðarviðurskifti.

Men felagsskapurin er eisini við til at seta gongd á granskingarverkætlanir innan aling.

Alarar úr teimum ymsu londunum skiftast um at vera vertur fyri árliga fundin og Havbúnaðarfelagið helt, at vit áttu eisini at bjóða okkum fram og sostatt er fundurin í ár haldin í Føroyum.

-áki-